## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 7 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin minkar hann vindin av norði, týsdagin upp í stívt andøvsgul av suðri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 7 stig.

# Vilt í Hvalba

**Tiltakið »Vilt í Suðri«, ið var í Vági í fjør, flytur í ár norður til Hvalbiar, har nógv áhugavert og spennandi er á skránni**

VILT
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í fjør var Vágur karmur um tiltakið, sum heppnaðist framúr væl, og sum veruliga fekk fólk úr allari Suðuroynni, eins væl og fólk norðanfjørs, at leita sær til Vágs. Flestu tiltøkini vóru ókeypis, og var okkurt til allar málbólkar. Í ár verður tiltakið "Vilt í Suðri" so hildið í Hvalba 3. mai.

Tað kann longu avdúkast, at sluppin Jóhanna ger fiskitúr runt Lítlu Dímun, eins og at teir fara at taka fólk umborð, ið velja at síga niður av Lítlu Dímun.

Tey, ið varða av Lítlu Dímun, fara at gera rættuliga nógv burturúr, tí tey hava leigað tyrlu til at flyta fólk til og úr oynni. Møguliga verður eisini fólkafundur á Lítlu Dímun.

Tað verður stórt skúmbað til børnini, kappkoyring, og so fara handlar eisini at hava serligar útsølur í Roynhøllini

Á kvøldi verður stór kvøldseta í Roynhøllini, har góður felagssangur er á skránni saman við tveimum av landsins kendastu skemtarum. Eisini verður serlig kolasuppa á skránni. Lagt er upp til eitt vilt tiltak í Hvalba 3. Mai, og meira er at frætta á www.vilt.fo.




## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -24 |
| Nuuk | -17 |
| Qaqortoq | -15 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 8 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 16 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 987 hPa. vestan fyri Skotland fer spakuliga í landsynning.



**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Írska Havinum fer spakuliga eystureftir og gevur framvegis landnyrðing á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/3 kl. $06^{00}$ – 27/3 $06^{00}$. Hitin í gjár: 2°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 26/3 kl. $06^{00}$ – 27/3 $06^{00}$.
Avfallið higartil í apríl: 96 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

6. apríl Tendring
7. apríl Mánin næstur jørðini
12. apríl Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10.apríl | 10:58 | 23:29 | 9:58 | 22:29 | 10:13 | 22:44 | 0:29 | 12:58 | 1:29 | 13:58 | 9:13 | 21:44 | 8:13 | 20:44 | 11:13 | 23:44 | - | 12:13 | 10:43 | 23:14 | 11:58 | - |
| 11.apríl | - | 12:00 | 11:00 | 23:30 | 11:15 | 23:45 | 1:29 | 14:00 | 2:29 | 15:00 | 10:15 | 22:45 | 9:15 | 21:45 | - | 12:15 | 0:44 | 13:15 | 11:45 | - | 0:29 | 13:00 |
| 12.apríl | 0:30 | 13:12 | - | 12:12 | - | 12:27 | 2:30 | 15:12 | 3:30 | 16:12 | 11:27 | - | 10:27 | 23:10 | 0:45 | 13:27 | 1:45 | 14:27 | 0:15 | 12:57 | 1:30 | 14:12 |
| 13.apríl | 1:55 | 14:35 | 0:55 | 13:35 | 1:10 | 13:50 | 3:55 | 16:35 | 4:55 | 17:35 | 0:10 | 12:50 | 11:50 | - | 2:10 | 14:50 | 3:10 | 15:50 | 1:40 | 14:20 | 2:55 | 15:35 |
| 14.apríl | 3:15 | 15:38 | 2:15 | 14:38 | 2:30 | 14:53 | 5:15 | 17:38 | 6:15 | 18:38 | 1:30 | 13:53 | 0:30 | 12:53 | 3:30 | 15:53 | 4:30 | 16:53 | 3:00 | 15:23 | 4:15 | 16:38 |

Alt um harmonikur

www.simme.eu